## Mentamálastýrið

# Deildarstjóri til Fólkaskúladeildina

***ar***

Nú deildarstjóri okkara fer úr starvi fyri aldur, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum deildarstjóri leyst at søkja í Fólkaskúladeildini.

Mentamálastýrið er skipað í 3 deildir: Fólkaskúladeild, Vinnu- og Miðnámsskúladeild og Mentamáladeild.

Høvuðsuppgávurnar hjá Fólkaskúladeildini eru at:

- Fyrisita hægru umsitingina av fólkaskúlanum og øðrum skúlum og stovnum
- Leggja til rættis og menna útbúgvingarnar og stovnarnar á økinum
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, gera uppskot um lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugabólkar
- Fremja samstarv við aðrar skúlar o.o., ið varða av økinum

Deildarstjórin er leiðari á Fólkaskúladeildini, og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini av deildini og teimum útbúgvingum, ið eru og koma á økinum. Deildarstjórin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at bygnaður og mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

***r e kakr***

Vit vænta okkum m.a. at umsøkjararnir hava

- Viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla ella læraraútbúgving við viðkomandi eftirútbúgving
- Leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt menniandi leiðslustíl
- Førleika til at menna samstarvið við aðrar skúlar og aðrar áhugabólkar
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir
- Áhuga fyri avbjóðingum

***b a***

Mentamálastýrið mennist alsamt, og verður tú sjálv/sjálvur í stóran mun við til at skapa starvið.

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir, umframt uttanlandssamstarvi.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

***e anar nar re r***

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Møguleiki er fyri, um so er at umsøkjari er tænastumaður frammanundan, at halda fram sum tænastumaður. Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokki hjá Tænastumanna-felagi Landsins. Talan kann møguliga verða um, at starvið verður áramálssett, t.d. í 5 ár, við einum lønarískoyti sum partarnir samráðast um.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fatar um aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna.

***kn***

Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Mentamálastýrið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2001. Starvið verður sett frá 1. august 2001 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálastýrinum, á tlf.

*__Men a a r__ hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
*Í __ka k a e n__ eru fólkaskúlarnir (uml. 60 í tali), Landsmiðstøðin fyri undirvísingaramboð, Musikkskúlar, Sernámsfrøðiligt virksemi, Føroya Skúlabókagrunnur, Føroya Fólkaháskúli, Húsarhaldsskúli Føroya og frítíðarundirvísingin.*

# Mála og pussa

Hví mála og pussa, tá ið tú kanst gera bæði í einari arbeiðsgongd. Skalsem puss og máling. Eisini havi eg Skalflex máling á goymslu.

Nærri fæst at vita við at ringja til

**Arni Samuelsen**
Tlf. 455775
Klaksvík

# Dagrøktari

Søkt verður eftir dagrøktara at byrja eftir summarfrítíðina.

Skrivlig umsókn verður at senda til

**Dagrøktina í Hvannasund**
740 Hvannasund
Tlf. 452185

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

# Skorsteinssópari

Sløkkiliðið hjá Tórshavnar kommunu søkir eftir skorsteinssópara.

**Vit bjóða**
eitt fjølbroytt starv, har umsøkjarin kemur í samband við flest øll húski kommununnar.

**Arbeiðsuppgávur**
Brunafyribyrgjandi uppgávur, reinsan/skráseting av skorsteinum og luttøka í arbeiðinum á sløkkiliðnum. Harumframt kemur umsøkjarin at luttaka sum "leysur" sløkkiliðsmaður.

**Førleikakrøv**
Tað er ein fyrimunur við handverkaraútbúgving ella royndum sum smiður/mekanikari. Neyðugt er at hava førarabrævtil akfar yvir 3,5 t.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður at seta skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum millum Tórshavnar kommunu og Starvsmannafelagið.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Peter Seloy, støðleiðara, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 31 51 60

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 2. juli 2001.

S N A R S K I V A N

# Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

Nýtt maritimt fyrireikingarskeið byrjar 1. august 2001.

Undirvíst verður í hesum lærugreinum:

Støddfrøði - Alisfrøði - Evnafrøði - Føroyskt - Danskt - Enskt - Týskt

Skeiðið endar við próvtøku í desember 2001. Næmingar, sum standa próvtøkuna, fáa atgongd til útbúgving á Maskinmeistaraskúlanum og Føroya Sjómansskúla.

Søkjast kann um útbúgvingarstuðul.

Skeiðið kostar kr. 1.200,-.

**Tilmelding á tlf. 317755**



T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

# Kunngerð

Tað verður við hesum gjørt kunnugt, at býráðið á fundi 31. mai 2001 samtykti,

*at* kalla havnarlagið uttan fyri eystara mola:

***Skansabryggja***

*at* kalla havnarlagið á Viðarnesi:

***á Viðarnesi***

**Tórshavnar kommuna**

S N A R S K I V A N

**Mentamálastýrið**
**Vinnu- og miðnámsskúladeildin**

# Stakgreinalesandi á students-/-HF-stigi

Tey, ið ætla sær at søkja um upptøku sum stakgreinalesandi í einari ella fleiri lærugrein/um á students-/HF-stigi verða biðin um at venda sær til studentaskúlan/HF-skeiðið, har ætlanin er at søkja um upptøku. Umsóknarblað um upptøku fæst frá skúlanum/skeiðnum.

Gjørt verður vart við, at umsøkjarar verða tiknir inn, í tann mun pláss er í teimum ymsu lærugreinunum.

Sambært Kunngerð um ávís gjøld frá 3. apríl 1998 skulu stakgreinalesandi rinda 300 kr. fyri hvørja lærugrein, viðkomandi innskriva seg til undirvísing í.

Seinasta freist at søkja um upptøku er 25. juni 2001.

Tórshavn 13. juni 2001
**Mentamálastýrið**

# Summarfrí

Sjúkrakassin er stongdur vegna feriu frá 18. juni til 1. juli 2001, báðar dagar íroknaðar.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**




Røktar- og umlættingarheimið
*Lágargarður*

**Lágargarður søkir eftir**

# sjúkrasystur í avloysarastarv

Fulltíðar sjúkrasystrastarv sum avloysari fram til 1. apríl 2002 er leyst at søkja til byrjan skjótast tilber, ella eftir nærri avtalu.

Starvið er við skiftandi vaktum, tó mest dagvaktir.

Lønt sambært sáttmála ímillum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja 316788.

Skrivlig umsókn við neyðugum prógvum skal sendast leiðaranum á

**Lágargarði**
Stoffalág 84
Boks 1188
110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er til 29.06.01.

# Hús í Kollafirði til sølu

Um hóskandi boð fæst, verða hús seld í Kollafirði.

Húsini standa í Líðini, sum er veðurgott og barnavinarligt umhvørvi. Húsini eru bygd í 1986, eru í góðum standi og í tveimum hæddum, 116 m² hvør hæddin. Miðhæddin er innrættað soleiðis: køkur, 2 stovur, trý trin niður til aðra, 3 kømur, baðiverilsi og bryggers. Stór altan er um húsini. Í kjallaranum er eitt kontór, restin av kjallaranum er ikki innrættað. Stykkið er 1040 m². Nýtt tak verður lagt á.

Áhugað kunnu síggja húsini eftir avtalu. Setið tykkum í samband við okkum á **tlf. 421095.**

# Kunngerð

## um broyting av Býarplaninum og byggisamtyktini fyri Runavíkar Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boða frá, at Býráðið á fundi 12. juni 2001 hevur viðtikið at endurskoða býarplanin og Almennu byggisamtyktina fyri Runavíkar Kommunu.

Broytingarnar í býarplaninum og Almennu byggisamtyktini eru til skjals á býráðsskrivstovuni í upplatingartíðini frá 18. juni til og við 6. juli 2001.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu verða býráðnum í hendi ís einasta lagi 18. september 2001.




Saltangará, tann 14.06.2001
**Runavíkar býráð**

# Pedagogur til Dagstovnin á Argjum

Søkt verður eftir pedagogi til stovu við 6-7 ára gomlum børnum at byrja 1. august.

Tann, sum søkir starvið er áhugaður í hesum aldursbólki og er við til at skapa eitt umhvørvi har børnini kunnu trívast og mennast. Somuleiðis at tú ert nýhugsandi og hevur ábyrgdarkenslu. Harumframt ynskja vit, at tú ert virkin á stovninum við atliti til viðarimenning av hesum.

Dagstovnurin á Argjum er ein sjálvognarstovnur. Á stovninum ganga 72 børn og samanlagt eru vit 18 starvsfólk.

Á stovninum eru fýra barnagarðstovur og tvær vøggustovur, har tann eina barnagarðstovan er ein serstova har vit samskipa deyv, tunghoyrd og hoyrandi børn. Á hvørjari stovu ganga 12 børn.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kann tú seta teg í samband við Gudrun W. Rasmussen, leiðara á tlf. 319019.

Umsóknin skal sendast til Dagstovnin á Argjum í seinasta lagi 7. juli 2001.

**Dagstovnurin á Argjum**
Traðagøta 55 · 160 Argir
Tlf. 319019, 319004 · Fax 319015
e-mail: dstargir@post.olivant.fo

## Advokatfelagið

Yviri við Strond 4 • Boks 359 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 • Fax 311261
Telefontíð: $9^{30}$-$12^{00}$ og $13^{00}$-$16^{00}$

Tórmóður Djurhuus, adv. Dánjal Magnussen, adv.
Jógvan Páll Lassen, adv. Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv. Anna Dam, adv.
IngiHøjgaard, adv.

# Trøð í Porkeri til sølu

Við hesum verður trøðin matr. nr. 215, Porkeri lýst til sølu.

Trøðin er til støddar 9.575 m².

Nærri upplýsingar um ognina kunnu fáast við at venda sær til

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4
100 Tórshavn
Tlf. 311260

